# Bert plaseringar eftir

**FLOGBÓLTUR** Tað einasta, ið eftir er at finna útav í Eikliguni hjá kvinnum, er um tað verður Fleyr ella Mjølnir, ið endar ovast í landskappingini og tí vinnur rætt til heimavøll í einari møguligari triðju FM-finalu

Hilmar Jan Hansen

Í vikuni var fyrsti dysturin í síðsta umfari í Eikliguni hjá kvinnum spældur, tá KÍF í Kollafirði tók ímóti ÍF. Hetta var annar av dystunum í síðsta umfarinum, sum í grundini slett ongan týdning hevði, tí hvørki KÍF ella ÍF kundu flyta seg nakað serligt á stigatalvuni.

ÍF, sum alt árið hevur ligið ovari enn KÍF, livdi eisini upp til favorittleiklutin og vann dystin 3-1. Kvinnurnar úr Fuglafirði vunnu fyrsta settið sannførandi, men í øðrum setti svaraði KÍF aftur og vann, tó at tað var tepurt. Men í triðja og fjórða setti var ÍF aftur betri og gjørdist bara meira og meira sannførandi, sum dystinum leið. Settúrslitini vóru 16-25, 25-23, 20-25 og 15-25.

## Fleyr ella Mjølnir

Tað einasta, ið eftir er at finna útav í kappingini hjá kvinnunum, er um tað verður Fleyr ella Mjølnir, ið endar ovast á stigatalvuni, tá síðsti dysturin er spældur og farast kann undir FM-finalurnar millum tey bæði liðini. Tað av teimum, ið endar ovast, fær heimavøll í einari møguligari triðju finalu.

Bæði liðini spæla sunnudagin, tá Mjølnir á heimavølli í Klaksvík tekur ímóti SÍ, sum leingi var á odda, men síðani varð yvirhálað av bæði Fleyr og Mjølnir. Hetta nýtist ikki at gerast nakar lættur dystur hjá Mjølni, hóast SÍ bara hevur æruna at spæla fyri, men kortini eru klaksvíkskvinnur favorittar.

Tað sama eru kvinnurnar hjá Fleyr, sum sunnudagin á útivølli skulu spæla ímóti TB, ið leingi hevur ligið tungt í sjónum miðskeiðis á stigatalvuni, men nú sær út til at hava fótað sær aftur. Triði dysturin í hesum seinasta umfarinum hjá kvinnunum verður á Toftum millum Ternuna og Drátt, men hann verður ikki spældur fyrr enn mánakvøldið.

## Bara ein eftir

Hjá monnunum er bara tann eini dysturin eftir, og hann er millum Mjølnir og SÍ, ið leingi kappaðust um at sleppa í finaluna ímóti ÍF. Ta kappingina vann Mjølnir, og fyri viku síðani kundi staðfestast, at SÍ endar við at fáa bronsuna, sum er nakað verri úrslit enn síðsta vetur, tá tað gjørdist til greipuna.

Hóast púrt einki í kappingini stendur á spæl undan dystinum í Badmintonhøllini í Klaksvík sunnudagin, man tað sama gera seg galdandi her, sum hjá kvinnunum, at spælt verður um æruna. Tí kann alt henda, hóast Mjølnir sum finalistur skuldi havt neyðugu styrkina til at vunnið. Men sum SÍ fyri viku síðani spældi Fleyr sundur og saman, kann alt henda.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Dystir um vikuskiftið:

**EIK-LIGAN, KVINNUR**

| | | |
|---|---|---|
| 20/03 | 15.00 | Mjølnir - SÍ |
| 20/03 | 15.00 | TB - Fleyr |
| 21/03 | 20.00 | Ternan - Dráttur |

**EIK-LIGAN, MENN**

| | | |
|---|---|---|
| 20/03 | 17.00 | Mjølnir - SÍ |

**SUNSET-KAPPINGIN**

| | | |
|---|---|---|
| 19/03 | 15.00 | Stjørnan - Kyndil |
| 20/03 | 14.30 | Neistin - Tjaldur |
| 20/03 | 15.00 | VB - VÍF |

**ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN**

| | | |
|---|---|---|
| 19/03 | 18.00 | Team Klaksvík - Kyndil |
| 20/03 | 16.00 | Neistin - H71 |
| 20/03 | 16.00 | KÍF - VÍF |

**KLAKSVÍKSKAPPINGIN**

| | | |
|---|---|---|
| 19/03 | 13.00 | KÍ - HB |
| 19/03 | 15.15 | NSÍ - EB/Streymur |
| 20/03 | 13.00 | *Dystur um triðjapláss* |
| 20/03 | 15.15 | *Finala* |



**KLASSAMUNUR**

*Kvinnurnar hjá Neistanum høvdu væl og virðiliga munin í grannauppgerðini ímóti Kyndli, men sleppa sunnudagin at royna seg í oddadysti ímóti Tjaldri*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Øll trý oddaliðini 32 stig

**KVINNUHONDBÓLTUR** Við sigri á grannunum í Kyndli, vann Neistin seg mikukvøldið upp á fremsta plássið í Sunset-kappingini, har liðið saman við Tjaldri og Stjørnuni hevur 32 stig. Júst Neistin og Tjaldur spæla um vikuskiftið

Hilmar Jan Hansen

Sum er, liggja tey trý bestu kvinnuliðini púra jøvn í stigum, men tey hava ikki spælt líka nógvar dystir, so tí er javnstøðan teirra millum bara fyribils. Neistin hevur spælt 21 dystir, Tjaldur 20 og Stjørnan 19.

Um alt hevði gingist eftir ætlan mikukvøldið, hevði Stjørnan spælt í Vestmanna ímóti VÍF, men av tí at veðrið var so vánaligt, fingu klaksvíkskvinnur útsett dystin, tí tær hættaðu sær ikki at koyra til Vestmanna. Nú hevur Hondbóltssambandið so ásett dystin at verða spældan mikukvøldið 6. apríl klokkan 19.45. Tað merkir, at Stjørnan til ta tíð kemur at hanga eitt sindur aftan fyri hini bæði, orsakað av írestandi dystinum.

## Greiður grannasigur

Dysturin á Hálsi í Havn varð tó ikki darvaður av veðrinum mikukvøldið, tí her var talan um uppgerð millum grannarnar, Kyndil og Neistan, men hesa ferð eydnaðist ikki Kyndli at arga grannarnar, sum onkuntíð fyrr í vetur.

Beinanvegin fóru kvinnurnar hjá Neistanum avstað frá Kyndli, og sum dystinum leið, var ongantíð nakar ivi um vinnaran. Neistin vann 30-19, eftir 16-9 í hálvleikinum. Hjá Kyndli skutu Heidi Maria Akselsen og Anja Heinadóttir fýra mál í part, og hjá Neistanum var Barbara Brauer toppskjútti við níggju málum og Birita Wardum skjeyt fimm.

Hesa ferð var klassamunur á liðunum, og Neistin hevur eisini síðstu dystirnar spælt so mikið sannførandi, at trúgvin upp á eitt finalupláss er við at koma afturíaftur.

## Uttan Anniku

Um tað eydnast ella ikki, verður komandi dysturin hjá Neistanum sera avgerandi fyri, tí hann verður sunnudagin á heimavølli ímóti Tjaldri. Hetta er ein dystur, Neistin ikki hevur ráð til at tapa, tí nú kappingin nærkast endanum, kunnu innanhýsis uppgerðirnar millum oddaliðini fáa alt at siga.

Tjaldur, sum týskvøldið vann greitt á StÍF, skal møguliga klára seg uttan Anniku Thomsen í restini av hesum kappingarárinum, tí hon í tí dystinum meiddi sær hondina. Cornelia Rimbu er farin av landinum, so á pappírinum sær Tjaldurs-liðið viknað út, men ímóti Neistanum kann so ein ábending koma um, hvussu tað verður við hesum endaspurtinum.

Stjørnan, sum er triðja av oddaliðunum, skal í morgin spæla á heimavølli ímóti Kyndli, og har má roknast við, at Stjørnan livir upp til tað, ið kann væntast – ikki minst, nú spælararnir eru svangir, eftir at eingin dystir bleiv mikukvøldið. Triði dysturin verður í Vági sunnudagin, har VB tekur ímóti VÍF.

*hilmarjan@sosialurin.fo*